# Teitur vrakar Universal og gevur sjálvur nýggju fløguna út

**Teitur gevur 1. mai fløguna »Stay Under The Stars« út, og hóast Teitur hevði sáttmála við Universal, er hesin sáttmáli ikki galdandi longur, fløgan kemur út á nýggja plátufelagnum Arlo & Betty**

Niels Uni Dam
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggja fløgan hjá Teitur var fyri nøkrum vikum, síðan liðugt ljóðblandað, og 1. mai verður hon givin út í Danmark, meðan hon verður útgivin 15. mai í Svøríki og Noregi. Christian Ulf-Hansen umboðsmaður hjá Teituri sigur, at sum er, kemur fløgan eisini út í Føroyum 1. mai. Men hann tingast í løtuni við útbreiðslu felagið í Norðurlondum Playground Music, um at fáa hana út 28. apríl í Føroyum. 3'arin er tann handilin, ið hevur selt flest Teitur fløgur í heiminum, og teir hava uppiborið at vera teir fyrstu, sigur Christian.

### Frálík fløga

Tey, ið hava hoyrt fløguna lata sera væl at. Christian sigur somuleiðis, at bæði hann og Teitur er nakað so øgiliga væl nøgdir við úrslitið. Á fløguni verða millum annað nógv av løgunum, ið vit hava hoyrt, hann spælt á konsertum seinasta árið. Her er um løg, sum tað droymandi og lokkandi "Waiting for Mars to come out", tað myrka og ófrættakenda lagið "Hitchiker", "Thief about to break in" og festliga næstan Frank Zappakenda lagið "Last kid on the playground". Hesi løg vísa øll eina eitt sindur skitnari og nógv sterkari síðu av Teitur, so tað verður spennandi at hoyra úrslitið

Upptøkur og ljóðbland eru gjørd í London, har bæði Teitur og Martin Terefe búgva. Martin Terefe er sera royndur tónleikaframleiðari, sangskrivari og ljóðblandari.

### Uppsagt samstarvið

Í sambandi við útgávuna hava Teitur og umboðsmaður hansara valt at siga sáttmálan við risa fyritøkuna Universal upp, og hava stovnað sítt egna plátufelag Arlo & Betty. Sambært umboðsmanninum Christian Ulf-Hansen er hetta navnið íblást av tveimum av yndis kassagittarunum hjá Teituri.

Orsøkin til, at Teitur og umboðsmaðurin hava valt at siga samstarvið við Universal upp, er tónlistarlig ósemja við A&R mannin hjá Universal, sigur Christian Ulf-Hansen, ið sigur, at teir annars vóru væl nøgdir við Universal. Men Teitur hevur flutt seg tónlistarliga ein annan veg, enn A&R umboðið hjá Universal vildi, og bæði Christian og Teitur ynsktu at halda fram á tí leiðuni, ið Teitur er farin. Tí avgjørdu teir heldur at siga sáttmálan upp, enn at gera A&R umboðum eftir vild.



*Í sambandi við útgávuna hava Teitur og umboðsmaður hansara valt at siga sáttmálan við risa fyritøkuna Universal upp, og hava stovnað sítt egna plátufelag Arlo & Betty*

# Rebecca St. James til Føroya

**31. mai fer ein av heimsins kendastu songkvinnum innan kristnan rokk & poptónleik at hava konsert í Føroyum. Rebecca St. James hevur játtað at koma til Føroya at framføra, nú hon er á heimskonsertferð saman við tónleikarum sínum. Konsertin verður í Kelduni í Skálafirði mikukvøldið 31. mai kl. 20:00**

KONSERT



*31. mai verður Rebecca St. james at hoyra í Kelduni í Skálafirði*

Kendi gospelsangarin Carman bað í 1990 avstralsku Rebecca St. James vera við á hansara konsertum í Australiu, og sama ár gav hon út sína fyrstu fløgu undir heitinum "Refresh my heart". Seinni flutti hon til USA, har hon í dag hevur sáttmála við Forefront Records.

Í 2000 vann Rebecca St. James Grammy virðisløn fyri bestu rokk gospel fløgu og var samstundis áttandi kunstnarin frá Avstraliu, ið fekk eina Grammy virðisløn eftir Oliviu Newton-John, Rick Springfield, Men at Work, Helen Reddy, Red Hot Chili Peppers, The Bee Gees og Barry Gibb.

Í november 2005 kom 12. fløgan frá Rebecca St. James á marknaðin. Tónleikurin á fløguni er ein blanding av góðum rokki og poppi, og fløgan verður róst upp um skýggja - hon verður mett at vera besta og erligasta útgávan hjá songkvinnuni yvirhøvur, sum eisini heiti á fløguni "If I Had One Chance To Tell You Something" ber boð um - hon hevur veruliga nakað at siga øðrum við tekstunum á hesari útgávuni.

Í 2005 var Rebecca eisini við til at gera sangir til kenda NARNIA filmin frá Walt Disney.

Eisini hevur Rebecca fleiri ferðir roynt seg sum rithøvund. Hóast bert 28 ára gomul, hevur hon longu givið út 6 bøkur, seinast bókina "Sister Freaks", sum kom út í fjør, og er eitt savn av 12 søgum um kvinnur til kvinnur. Bøkurnar hjá henni hava fleiri ferðir verið útseldar.

Á ferðini til Føroya hevur Rebecca St. James fult orkestur og egnar teknikkarar. Við teim átjan fólkunum í ferðaliðnum er hetta størsta gospelkonsert síðani Michael W. Smith vitjaði í 1996.

Við sær hevur Rebecca St. James eisini týsku Sarah Brendel. Sarah fer at hita áhoyrararnar upp áðrenn konsertina í Kelduni, men fer harumframt sjálv at hava konsertir í Føroyum dagarnar eftir konsertina í Kelduni. Hesar verða í Christianskirkjuni í Klaksvík, Berøa í Saltangará og í Havnar kirkju.

Sarah Brendel hevur ligið nummar eitt á almenna hittlistanum í Týsklandi í 20 vikur og er í løtuni við at fóta sær á amerikanska marknaðinum.

Fyrireikararnir upplýsa, at konsertirnar við Sarah Brendel eru ókeypis, og at konsertin við Rebecca St. James kostar 275 kr. Atgongumerkir verða at fáa í Shell og Vár, nærri verður lýst um hetta seinni.

Tað er felagið Gjamma, sum stendur fyri konsertunum. Meir fæst at vita á www.gjamma.com, har atgongumerki eisini kunnu bíleggjast umframt at fløgur hjá Rebecca St. James og Sarah Brendel kunnu fáast fyri serligan prís nú.